Útlendsk ránsveiða á føroyska byggimarknaðinum

tilboð, men nú er ætlanin at lata teir halda fram. Ikki verður arbeiðið útboðið, men tingast skal um ein pris, verður sagt.

Á Sundi er sama skilið. Her kom ein privatmaður í Havn til kommununa við einum tilboði, hann hevði fingið frá E. Pihl & Søn. Sjálvandi tekur kommunan av alt fyri eitt.

Sáttmálin enntá loyniligur

Hvør minnist ikki víðagitna arbeiðið hjá SEV á Eiði. Danska fyritøkan Højgaard & Schultz varð biðin um at gera arbeiðið, og hóast landið skuldi veðhalda fyri risastórar miljónaupphæddir var byggisáttmálin loyniligur.

Annars er at siga um SEV, at so at siga alt hetta felag hevur bygt seinastu árini, hava útlendingar staðið fyri.

Fiskasølan og E. P. & S.

Tá Fiskasølan. av enn ófatiligum orsøkum, fekk byggiloyvi til sín skansa við síðuna av gamla Havnar Skansa, varð danska byggifelagið E. Pihl & Søn biðið um at gera projektið. Tær føroysku byggifyritøkur, sum har arbeiddu, arbeiddu fyri Pihl & Søn.

Seinastu útbyggingina hjá Fiskasøluni gjørdi eisini E. Pihl & Søn. Tað vil siga, at E. Pihl & Søn hevði høvuðsarbeiðstøkuna, meðan teir fingu útlendskar fyritøkur at gera arbeiðið fyri seg. Nú skal Fiskasølan byggja á Sandvíkahjalla, og spennandi verður, hvør skal hava hetta arbeiðið.

»Okkara banki«

Tá Sjóvinnubankin skuldi byggja á Trapputrøðni, vóru eingi boð eftir føroyskari fyritøku. E. Pihl & Søn skuldi gera projektið og standa fyri byggingini. Síðani kundu tær føroysku fyritøkurnar verða ifylla.

Høllirnar á Hálsi

Men tað eru ikki bert Tórshavnar Kommuna, SEV og Fiskasølan, sum hava alsk til útlendskt. Heldur ikki Landsverkfrøðingurin heldur seg aftur, fyri ikki at tala um tær mongu hallirnar á sokallaða idnaðarøkinum á Hálsi og aðrastaðir við.

Aftur á hond

Tað er ikki ov nógv sagt, at viðvíkjandi føroyskum byggivirkjum, sum annars hevur borið orð fyri at hava ligið á einum høgum tekniskum støði, gongur álvarsliga aftur á hond.

Føroyingar hava bygt brýr, gjørt berghol, havnir, lendingar, stórar sum smærri bygningar og annað mangt. Væl úr hondum greitt, men nú tykist, sum skal bert ein beinagrind úr stáli setast upp, so mugu útlendingar til tess.

Burtursæð frá, at hetta eru pengar beinleiðis av landinum, forðar hetta fyri, at tær føroysku fyritøkur, sum fáast við tilikt virksemi, ikki fáa lut í ti teknifrøði, sum er og skal til á hesum øki.

Fáa ikki ment seg

At okkara byggifyritøkur, sum eru ein partur av vinnu okkara, í mongum førum als ikki fáa loyvi at bjóða upp á eitt arbeiði millum annað frá tí almenna, ger sjálvandi eisini tað, at hesar aftra seg við at útbyggja, víðka, og kunna tí ikki menna seg.

Tað, sum nú hendir istaðin, er, at útlendsk feløg ótarnað og í stórum tali reka ránsveiði á føroyska byggimarknaðinum.

Fleiri av hesum fyritøkum koma higar sum tjóvur á nátt og verða ongastaðni skrásettar — gera sítt arbeiði og fara so av aftur landinum við posa og sekk.

Tá virksemið minkar aftur

Mong spyrja, hvussu verður, tá virksemið einaferð minkar aftur. Tað er sjálvandi ikki lætt at svara, men eitt er rættiliga vist. Tá standa vit eftir við einari rúgvu av »tannleysum« byggifeløgum, har neyvan verður nakað sum hevur møguleika at átaka sær eitt stórt arbeiði í bræði.

Skattaspurningurin

Vit hava so manga ferðir vist á, hvussu vitleyst tað er, at flestu av útlendsku feløgunum sleppa undan at rinda so mikið sum eitt einasta oyra av skatti í Føroyum. Hvørki felagið sjálvt ella arbeiðsfólkið hjá teimum rinda skatt her.

Nú er tað so hent, at landsstýrið saman við Líkningarráðnum hevur í umbúnað at gera broyting. Broytingin miðar imóti, at øll arbeiðsmegi, sum verður leigað til Føroya, skal rinda skatt frá fyrsta degi og ikki eftir teimum 180 døgunum sum nú.

Men kemur ein útlendsk fyritøka til Føroya við sínum egna fólki, verður eingin skattur latin í Føroyum. Heldur ikki eftir teirri nýggju skipanini, sum er í umbúnað.

Skattavaldið fær sjálvandi fleiri skattakrónur í kassan, men hetta hjálpir einki upp á útlendsku ránsveiðuni á føroyska byggimarknaðin.

Kann nakað gerast?

Tað allra fyrsta er við at viðurkenna føroyskt byggivirksemi — herundir arbeiði við vegum, havnum, brúm v. m. — sum ein vinnuveg, sum eisini hevur sín týdning fyri landshúsarhaldið.

Harnæst at stuðla hesum partinum av føroyskum virksemi við at — fyrst og fremst tað almenna — letur teimum alt tað arbeiði, sum gerast skal í hesum landi, og somuleiðis roynir at laga virksemi eftir teirri orku, sum er í hesum samfelagi.

Heldur ikki var annað enn rætt og rímiligt, at teir føroysku grunnar — og fyri alt tað bankar — tryggjaðu sær, áðrenn peningalig játtan varð givin, at arbeiðið um ikki annað, eisini varð boðið út til føroyskar fyritøkur. Í staðin fyri at ein útlendsk fyritøka gloypir øllum, var nógv betri, at hendan var føroysk og um neyðugt fekk sær serkøna hjálp uttanifrá.

Er tað á nøkrum øki at stýring nú er neyðug, so er tað á hesum. Og tað ber væl til. Tað krevst bert ein politiskur vilji og ikki minst ryggur til viðhvørt at tora at siga nei.

Føroyski happadrátturin

2. dráttur

drigin 19.10.1987

50.000 kr. 5879
25.000 kr. 9994
20.000 kr. 10836
15.000 kr. 13016
10.000 kr. 1815 2028 4408 9507

5.000 kr.

1315 1327 2158 4053 4482 5220 7668 8654 9756 10066 13104

3.000 kr.

856 1735 2410 2828 4278 4576 4721 9221 9474 9481 9532 10535 12140 12512,

2.000 kr.

1511 3522 3678 5349 6583 7271 7639 8353 9819 9929 9952 10777 12033 12051 12160 13075

1.000 kr.

1085 1790 2734 3843 3889 4174 4419 4704 4925 5887 6192 6268 6586 7105 7227 8750 9414 9967 10819

500 kr.

292 300 938 1410 1476 1552 2044 2056 2384 3193 3521 3609 3832 4101 4283 4752 4839 5046 5069 5255 5283 5651 6550 6558 6563 6847 6993 7479 7606 7627 7925 7977 8063 8073 8639 8643 8669 8979 9219 9328 9408 9508 10340 10391 11059 11175 11303 11556 12096 12182 12298 12465 12687


200 kr.

9 50 90 94 135 153 211 241 317 496 501 502 503 526 557 620 678 733 784 859 949 1036 1171 1178 1260 1314 1316 1356 1603 1623 1786 1811 1827 1842 1850 1851 1909 1947 2088 2490 2573 2821 2895 2908 2909 3050 3087 3293 3321 3446 3484 3596 3652 3656 3784 3867 3945 4022 4145 4186 4222 4248 4292 4295 4517 4696 4698 4729 4749 4775 4777 4872 4949 4961 5115 5127 5177 5200 5227 5248 5439 5491 5499 5513 5605 5666 5717 5881 5889 6120 6181 6283 6555 6797 6961 6989 7054 7109 7187 7203 7252 7445 7504 7529 7537 7579 7599 7695 7789 7917 7983 8030 8174 8275 8387 8421 8436 8450 8524 8573 8590 8623 8651 8772 8816 8898 8925 8968 9003 9028 9165 9190 9270 9292 9362 9400 9431 9464 9562 9619 9630 9652 9668 9808 9874 10021 10219 10335 10481 10492 10522 10543 10560 10576 10664 10720 10738 10757 10789 10806 10826 10852 10894 10930 11311 11370 11463 11491 11542 11576 11665 11686 11705 11707 11739 11743 11910 11922 11931 11940 12004 12296 12355 12367 12406 12454 12532 12547 12563 12573 12606 13021 13105

Vinningarnir verða útgoldnir beinanvegin við frádrátti av 10%.
Vinnararnir verða bidnir um at venda sær til happadráttarseljarar sínar.
Vinningur má avheintast áðrenn 6 mánaðir frá dráttardegnum.

Føroya Landsstýri
19.10.1987
(Happadrátturin)

SEMPERIT
KAVA- OG PÍKADEKK
til persónbilar



DEKKSØLA OG BILVERKSTAÐUR
v. Jógvan Dahl, Tlf. 22220, 450 Oyri
Rólant Haraldsen Tlf. 33113, 370 Miðvágur